## SetHúsaSølan

Sp/f SHS · Tórsgøta 16 · Postboks 3156 · FO-110 Tórshavn
Fax 320 252 · sethusas@post.olivant.fo · www.sethusasolan.fo
Avgrei slutí : 10 - 13 á tel 210252
Skrivstovan opin: 13 - 16 tel 320252

NÝTT



**Hoyvík: Sethús til sølu**
Millum Gilja 70,matr. nr. 1 lb, grundøki 501m².
Væl umsitin sethús við tveimum íbúðum og stórari garasju í kjallaranum, bygd 1988. Húsini eru í trimum hæddum, kjallari, miðhædd, hvør uml.109 m². + loftshæddin 87 m²
Húsini hava stoypta kjallarahædd, yvirtrom úr rotfríðum timbri. Tekjan er takt við Icopal.
Kjallarahæddin: Durur, gong, køkur, stova, kamar, baðirúm, stór garasja við inngongd beinleiðis inn í kjallarin, trappa upp á stovuhæddina.
Stovuhæddin: Gong, køkur, stova, baðirúm og stórt hjúnarrúm, trappa uppá loft. Loftshæddin: eitt stórt rúm.
Út frá stovuhæddini er ein stór altan sum vendir rætt ímun til sólina. Húsini liggja frítt fyri, hava giring og vakran urtagarð kring húsini, dagstovnur og fótbóltsvøllur beint yvirav og gott bussamband oman í býin.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið!**



**Tvøroyri: Sethús til sølu**
matr. nr. 265, grundøki 230 m².
Húsini eru í 3 hæddum á 43 m².
Í stovuhæddini er gong, køkur, stova.
Á loftshæddini er gong við skápum,
2 kømur og baðirúm.
Kjallarin er óinnrættaður.
Húsini eru eini eldri hús, ið liggja á Hvítanesi, gjørd av timbur, klødd og takt við zinki.
Húsini hava gott útsýni, men krevja ábøtur.
**Lægsti prísur kr. 225.000,-**



**Miðvági: Sethús til sølu**
matr. nr. 220 g, grundøki 722 m².
Húsini eru timburhús í 2 hæddum, íalt umleið 140 m².
Á stovuhæddini er gong, køkur, stova, grovkøkur/fýrrúm, baðirúm v/kari og goymslu/klædnarúm.
Á loftshæddini er sjónvarpsstova við atgongd til altan, hjúnarúm v/klædnarúmi, 2 kømur og baðirúm v/brúsu.
Húsini eru norsk sniðhús (SYSTEMHUS), eru nýggj, hava dustsúgvara- og luftútskiftingarskipan og eru annars útviklaði í samráð við Astma- og Alergifelagið í Noreg.
**Verður selt, um nøktandi boð verður givið!**

Sosialurin 341800



**Sandavágur: grundøki til sølu.**
matr. nr. 87h, Sóljuteigur 11, stórt 646 m².
Grundøkið liggur í nýggju útstykkingini hjá Sandavágs kommunu, til høgru frá høvuðsvegnum tá man kemur til bygdina.
Stykkið er klárt at byggja á, sprongt, útgrivið og planerað.
**Minsta boð kr. 150.000,-**



**Hvalvík: Grundøki til sølu**
matr. nr. 56t, stórt 579 m².
Byggibúgvið og byggiklárt.
Stykkið er útgrivið, planerað, liggur tætt við barnagarð, skúla og fótbóltsvøll.
**Minsta boð kr. 150.000,-**

**Sandur: Sethús við garasju til sølu**
matr. nr.42b, grundøki 654 m². bygd 1988.
Húsini hava stoypta grund, yvirtromin træ, klødd við rotfríðum timbri. Húsini eru í 3. hæddum.
Hjallara og miðhædd, hvør hæddin 103 m².
Loftshæddin uml. 82 m².Hjallur er bygdur fastur í húsini.
Garasjan er 24 m² og er leys frá húsinum.
Stovuhæddini: Durur, gong, køkur, stova, tvey kømur baðirúm/wc og hjúnarrúm.
Loftshæddin: Eitt stórt rúm, ikki innrættað.
Kjallarahæddin: Gong,stova, kamar og vaskirúm.
Húsini standa mitt í bygdini.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**



www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo


FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Leiðari til KT-tænastuna á Fróðskaparsetrinum

KT-tænastan hevur ein týðandi leiklut í menningini av Fróðskaparsetri Føroya. KT-tænastan hevur ábyrgdina av teldunetinum hjá stovnunum á Debesartrøð og nær -netinum á Fróðskaparsetrinum. Hon skal stuðla setursdeildum og brúkarum við KT-nýtslu. Hon skal samstarva og samskifta við stovnar og KT- veitarar uttan fyri Fróðskaparsetrið. KT-tænastan skal ráðgeva setursráðnum í yvirskipaðum KT-málum frameftir. Tað krevur tænastusinnað fólk, sum bæði eru tøkniliga væl fyri og hava visjónir.

**Vit vænta, at tú hevur:**
- drúgvar royndir við at menna og skipa strategiskt KT-arbeiði
- neyðuga førleikan at leggja framtíðar ætlanir fyri KT-økið
- persónligu eginleikarnar at fremja ætlanir í verki
- hægri útbúgving ella viðkomandi royndir innan kunningartøkni
- leiðsluroyndir og góð samstarvsevni
- tænastusinni og visjónir

**Vit bjóða:**
- mennandi og spennandi arbeiðsumhvørvi
- samstarv við fremstu føroysku granskararnar
- løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag

**Tað tekniska:**
KT-tænastan fevnir um Windows- og Linuxskipanir á brúkarateldum, Novellnetskipan og Novell GroupWise postskipan, Windows Server 2003, Microsoft ISA server 2003, MicroSoft SQL server 2000, Sophos Anti-virus, Veritas BackupExec Server, sum stýrir einum IBM 3582-23L tape library, SysAid HelpDesk, HP SAN 1000 diskar, Cisco routarar og Switch'ir, sum umsøkjarar mugu hava hollan kunnleika til. Harafturat er Fróðskaparsetrið í gongd við at innføra ISO-17799 trygdarstandardin. Høvuðsbrúkarabólkarnir eru granskarar, undirvísarar, fyrisitarar og studentar, sum brúka KT-skipanir dagliga til samskifti, gransking, undirvísing og fyrisiting. Dagliga arbeiðið av datanetinum á Debesartrøð fevnir í stuttum um:
- at hava eftirlit við kjarnuskipan og samsvarandi samskiftisútgerð
- at viðlíkahalda felags trygdartænastur hjá stovnunum
- at samskifta og samstarva við netvørðarnar á teimum fimm stovnunum
- at umsita web-, ftp-, navna- og postambætararnar
- at samskifta við veitarar av KT-útgerð sum heild
- at samskipa dagføringar, umleggingar og útbyggingar í netskipanini

**Treytir og umsóknir**
Lønar- og setanarviðurskifti verða sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Nærri upplýsingar um starvið og tøknilýsing kunnu fáast við at venda sær til Anniku Sølvará á telefon 352500 ella teldupost annikas@setur.fo ella til Hans Birgir Højgaard, KT-leiðara á 352570 ella birgirh@setur.fo

Umsóknir við prógvum, ævisøgu (CV) og møguligum viðmælum skulu stílast til Setursskrivstovuna í seinasta lagi 11. januar 2006. Starvið verður sett frá 1. mars 2006 ella skjótast til ber.

**Umsóknir skulu sendast til:**
**Setursskrivstovuna**
**J.C. Svabos gøtu 14**
**Postrúm 272**
**FO-110 Tórshavn**


## HVÍ IKKI KEYPA JÓLATRÆ FRÁ NEISTANUM



Jólatrø kunnu keypast og heintast - við Gundadalshøllina hesar dagar:

| | | |
|---|---|---|
| Leygardagin | 17. desember | millum kl. 13 og 18 |
| Sunnudagin | 18. desember | millum kl. 15 og 18 |
| Mánadagin | 19. desember | millum kl. 18 og 20 |
| Týsdagin | 20. desember | millum kl. 18 og 20 |
| Mikudagin | 21. desember | millum kl. 18 og 20 |

**Kostnaðurin er 200 kr. íroknað lutaseðil**

NEISTIN



i
Sosialurin